

# Statoil-stjórin fer at kanna Utsira-avgerðina nærri

**Jan Müller**

19.05.2014 - 17:25

Oljan.fo

Helge Lund dylur ikki fyri, at hann gjørdist ikki sørt ørkymlaður fríggjadagin, tá meirilutin í Stórtinginum gjørdi av, at allar útbyggingarnar á Utsirahæddini skulu hava elektrisitet úr landi, og at hetta hendir næstan eitt ár, áðrenn Statoil ætlar at leggja sína útbyggingarætlan fyri Stórtingið.

Statoil-stjórin vísir á, at politikararnir plaga ikki at koma við viðmerkingum, fyrr enn oljufeløgini hava latið teimum eina formliga ætlan um útbygging og rakstur, og tað hevur heldur ikki verið vanligt, at Stórtingið hevur kravt stórvegis broytingar, sigur hann við Dagens Næringsliv. Loysnin, sum meirilutin í Stórtinginum nú hvur givið boð um, er sostatt óvanlig í norskari oljusøgu, skrivar blaðið.

Helge Lund dugir ikki at siga, um tað, sum nú er hent, er ein ábending um, at umsitingarhátturin verður broyttur. Hann má hyggja nærri at málinum fyrst, sigur hann.

-Eg má hyggja nærri at hesum. Men sum heild má eg siga, at vit hava havt ein umsitingarhátt, sum virkar og hevur virkað sera væl, og sum hevur gjørt okkum før fyri menna verkætlanir á ein skilagóðan hátt í Noregi. Og tað eiga vit at verja í framtíðini, sigur Helge Lund.

Oljugreinarin Hans Henrik Ramm sigur við Finansavisen, at tað er ivasamt, um uppskotið um at áleggja oljufeløgunum á Utsirahæddini at brúka streym innan av landi yvirhøvur er lógligt.

-Man sama um tað er lógligt ella ikki, so er tað í stríð við góðan umsitingarsið at broyta mannagongdir í verandi verkætlanum og at krevja loysnir, sum eingin kennir avleiðingarnar ella kostnaðin av. Eg dugi ikki at síggja, at stjórnin hevur nakað grundarlag fyri at góðtaka, at hettas kravið verður sett feløgunum, sigur Hans Henrik Ramm við Finansavisen.